Dagurin

3. august. Nikodemus. Dagurin verður hildin til minnis um farisearan, sum kom til Jesus á náttartíð (Jóhs. 3, 1-21). Halgisøgur siga, at eftir deyða Jesu varð Nikodemus kristnaður og doyptur av ápostlunum Pæturi og Jóhannesi.

Grikst navn, ið merkir *sigur yvir fólkinum.*

Dagurin verður eisini róptur *ólavsøka síðara*, til minnis um, at bein Ólavs vórðu flutt í kirkjuna og løgd í skrín. 3. august í 1030 varð hann lýstur at vera *heilagur maður.*

zarepta – 2004

Lega fyri 18 ár og eldri verður 13.–15. august.

Tekning innan týsdagin 10. august á tlf. 332140

Veri vælkomin á Zarepta

Tøkk

Hjartans tøkk skulu tit øll hava, sum gjørdu mær 80 ára føðingardagin ógloymandi.

Tøkk til Hotel Hafnia fyri frálíka borðreiðing og fyriskipan.

Tøkk skulu tit hava, sum høvdu orðið, tað fløvaði, at tit mínir gomlu næmingar, takkaðu fyri góð minnir frá skúlatíðini.

Tøkk øll tit, sum komu á Hafnia, fyri gávur, blómur, fjarrit og øll tit, sum ringdu.

Túsund tøkk øll somul.

Erling Poulsen

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu og hjálpsemi,
tá ið elskaði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

Knút Sigurskjold Ellingsgaard
Leirvík

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar og gávur.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serlig tøkk til sjúkrasystrarnar á B6.
Vit takka Regini Høgnesen og Jógvan Páll Sevdal fyri troystarrík orð í heiminum. Meinhardt Bjartalíð fyri góð orð í kirkjuni, kirkjutænarum og sangarum og tykkum øllum, ið hjálptu so væl til við ervinum.

Fyri tey avvarðandi
Agnes, Maiken, Tove, Herolv, Hjartvør og Hjørdis v/ familjum

Fiskur kann flytast sjóvegis á Meginlandið upp á 15 tímar

– Við einum góðum, skjóttgangandi skipi, kundi fiskur verið fluttur á Meginlandið úr Vági til Scrabster upp á 15 tímar, heldur Vinnuráðið fyri Suðuroyar sunnaru helvt, sum hevur gjørt eitt uppskot um, hvussu feskur fiskur sjóvegis kann flytast úr Føroyum á marknaðin á Meginlandinum

FISKAÚTFLUTNINGUR
Vinnuráðið fyri Suðuroyar sunnaru helvt

Vísandi til stóru umrøðuna seinastu tíðina um útflutning av ferskum fiski og fiskaúrdráttum, og trupulleikunum við flutningi av somu, vilja vit her koma við uppskoti hesum viðvíkjandi.

Fersk vøra eigur sjálvsagt at verða marknaðinum í hendi skjótast til ber, og merkir hetta í flestu førum, t.d. í Íslandi og norðara parti av Noregi, at flogfør verða nýtt til henda flutning.

Í Føroyum tykist hesin møguleiki ikki heilt so eyðsýndur, í fyrsta lagi tí flogvallarviðurskiftini ikki eru nøktandi um heilt stór farmaflogfør skuldu verið nýtt, og í øðrum lagi tí fjarstøðan til europeiska meginlandi ikki er eins stór og fyri omanfyri nevndu økir.

Okkara meting er, at hóast smærri nøgdir óivað kundu verið fluttar loftvegis, hevði besta búskaparliga, tekniska og samfelagsliga loysnin helst verið at nýtt sjógvegis samband til henda útflutning okkara. Hetta sjógvegis sambandi skal sjálvsagt verða við skjóttgangandi skipi og sjálvsagt skal verða siglt styttstu leið fyri at vøran kann verða so fersk sum gjørligt.

Styttsta fjarstøða millum egnaðar havnir í Føroyum og á Meginlandinum er helst Vágur - Scrabster. Við góðum skipi kundi hesin teinur verið sigldur uppá uml. 15 tímar, og merkir hetta, at fiskur lagdur upp í Vági, kundi verið á Meginlandinum innan eitt samdøgur. Við góðum sambandi innlendis í Føroyum, hevði verið møguleiki fyri at sama var galdandi fyri restina av Landinum. Á sama hátt hevði møguleiki verið fyri at fersk fløk og aðrir úrdráttir kundu verið á Meginlandinum innan eitt samdøgur eftir at hesi vóru virkað.

Í syðru helvt av Suðuroy er arbeiðsloysi stórt, nógvir góðir virkisbygningar standa tómir, havnaviðurskiftini verða fyrsta dagin millum tey bestu í Landinum, og møguleikarnir til at kalla alla vinnu eru av teim bestu um bert nøktandi flutningssamband er til staðar.

Samstundis gera nógv vart við, at alt ov stórur partur av fiskiveiðu okkara fer óvirkað av Landinum. Eisini fer annan stórur partur av okkara rávørutilfeingi, tvs. innvølir v.m. til spillis.

Hví ikki bøta um allar hesar truppulleikar í einum?

Hetta kundi t. d. verið gjørt á henda hátt:

1. Skjóttgangandi skip verður sett at røkja farleiðina Vágur - Scrabster, helst dagliga.

2. Innanoyggja verður skip sett at røkja farmasigling til og av Vági.

3. Til tess at tryggja nóg stórar nøgdir til nýggju farmaleiðina mugu Landsins myndugleikar lóggeva um, at fiskur fiskaður á føroyska landgrunninum av føroyskum fari, skal um føroyskan bryggjukant.

4. Somuleiðis má lóggevast fyri, at allur fiskurin skal gagnnýtast.

Avleiðingarnar av hesum tiltøkum høvdu m. a. verið at:

- Stórur partur av fersku fiskaúrdráttunum framleiddir aðra staðni í Føroyum blivu avskipaðir umvegis Vág. Við tað at henda farleið verður munandi skjótari enn núverandi, eigur fiskurin at verða munandi feskari, tá hann er keyparinum í hendi, og eigur hetta at betra um sølumøguleikarnar.

- Somuleiðis fyri stóran part av alifiskinum.

- Stórur partur av tí fiski sum í dag verður sendur óvirkaður av landinum, hevði verið lagdur upp í Vági og síðan sendur víðari við farmaskipi higani. Hetta hevði givið fiskiførunum, ið annars sjálvi sigla fiskin á útlendskan marknað, munandi betri tíð at fiska, manningin fekk meira frítíð og oljusparing hevði eisini verið.

- Fiskur ið kom við høvdið og/ella ókruvdur á land, kundi verið hagreiddur í einum av tómu virkisbygningunum í Vági. Hetta hevði økt nógv um virði av fiskaveiðu okkara samstundis, og nógv arbeiðspláss fingust burtur úr hesum.

- Nógvi farmaflutningurin hevði harumframt lagt nógvan pening eftir sær í Suðuroynni bæði sum lønarútgjaldingar og t. d. kaigjald. Eisini hevði hetta bøtt munandi um nakrar av størstu truppulleikum fyri verðandi virkir, nevnuliga ringa flutningssambandið bæði innanoyggja og útlendis og høga flutningskostnaðin.

Ikki skuldi verið neyðugt við stórum íløgum fyri at framt omanfyri nevndu tiltøk.

Eitt av verandi skipafeløgum kundi møguliga røkt uttanlandssiglingina, meðan Smyril við skinsamari ferðaætlan kundi røkt innlendis farmaflutningin, hetta tó bert uttan at nerva ferðafólkaflutningin til og úr Suðuroynni.

Um ikki hetta var møguligt kundu helst aðrir privatir einstaklingar og/ella feløg sligið seg saman um at fingið hetta at borið til, heldur Vinnuráðið fyri Suðuroyar sunnaru helvt.

Greitt er tó. at um oman fyri nevnda ætlan bleiv veruleiki, hevði hetta bøtt munandi um støðuna í syðru helvt av Suðuroynni, samstundis og restin av Landinum eisini hevði notið gott av hesum, heldur Vinnuráðið.

Vágur

Tað vindur alt meira upp á seg at ferðast við húsbilum við Norrönu. Mánamorgunin løgdu 77 húsbilar leiðina úr Havn inn á Skála, har tey skulu halda til á nýggja kampingplássinum við ítróttarhøllina

Mynd: Maria Olsen

Húsvognar gjørdu innrás á Skála

Við Norrönu mánamorgunin komu 77 húsvognar við 156 fólkum úr ymsum londum á meginlandinum, sum eru á veg til Íslands. Tey gista á kampingplássinum á Skála til tey fara víðari við Norrönu í morgin

KAMPINGFERÐ
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Tað var ein long rød av húsbilum og húsvognum, sum var á veg norður eftir mánamorgunin, eftir at Norröna var komin úr Danmark.

Talan er um ferð, sum m. a. Dansk Autocamperforening skipar fyri, og við eru m. a. fólk úr Danmark, Týsklandi, Belgia, Noreg, Svoríki, Finnlandi.

Tað var sjálvandi trupult at at hýsa so mongum húsvognum í Føroyum, men Ferðavinnan í Eysturoy fekk loyst hendan trupulleika, soleiðis at nýggja kampingplássið á Skála kundi hýsa teimum.

Janus Ulldal á Skála, sum rekur plássið, hevði úr at gera í morgun, tá Sosialurin ringdi til hansara. So mong fólk hava tey ikki havt har á plássinum, sum lat upp fyrr í ár. Hetta plássið er við ítróttarhøllina á Skála, og hava tey atgongd til kafetria og toilettini í høllini.

Tá Sosialurin vitjaði á Skála mánamorgunin, sótu fólkini við morgunmatarborð. Seinni mánakvøldið varð skipað fyri føroyskum mentanarkvøldi - eitt nú við føroyskum dansi.

Meðan ferðalagið vitjar í Føroyum verður skipað fyri ymsum útferðum, eitt nú til Selatrøðar, Vestmanna og Kirkjubøar.

Fleir fólk eru annars við í ferðalanum, sum fer til Íslands í morgin, tey koma úr Bergen og koma tí ikki í land í Føroyum á veg til Íslands.

Janus Ulldal og hini á kampingplássinum við ítróttarhøllina á Skála høvdu úr at gera mánamorgunin, tá teir 77 húsvognarnir gjørdu innrás. Helst verður tað vanligari sjón á føroyskum kampingplássu at síggja húsvognar av Meginlandinum, nú Smyril Line ger meira fyri at sleja slíkar ferðir

Mynd: Rúna Sivertsen

151 húsvognar til Íslands

Ferðalagið við morgunmatarborðið í ítróttarhøllini á Skála

Mynd: Rúna Sivertsen

Við nýggju Norrönu er møguleikin at ferðast við húsvongum munandi bøttur

KAMPINGFERÐ
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

– Vit hava nógv betri møguleikar við nýggju Norrönu, tá tað snýr seg um húsvognar, og hendan túrin úr Danmark vóru 104 húsvognar við. Tilsamans vóru 33 akfør við hendan túrin, sigur Áki Jespersen, ferðafólkaleiðari á Smyril Line.

Tey á Smyril Line leggja seg sum vera man nógv meira eftir hesum marknaðinum, nú møguleikarnir eru so góðir.

Størsta talið av húsvognum, sum fluttir eru við Norrönu verður í morgin, tá Norröna fer til Íslands, tá 104 slíkir vognar verða við. Umframt teir, sum komu við Norrönu í gjár, koma eisini fleiri við úr Bergen.

Norröna kann taka til samans 800 persónbilar. Tá húsvognar eru ímillum, verður talið sjálvandi nakað lægri. Skipið flytur eisini nógvan farm, men tíðin, tá bilar standa eftir, er farin – í øllum førum nakað framyvir – sigur Áki Jespersen.